


Størsti spenningurin undan ólavsøkuni man vera, hvør bátur vinnur Útvarpssteypið. Eftir fyrstu seks FM-stevnurnar eru tríggir bátar, sum hava fult stigatal. Teirra millum Eysturoyingur

# Ov lítil spenningur

**Kreppa ella ei, so hevur spenningurin í øllum førum ikki verið serliga stórur í kappróðrinum í ár. Somu bátar hava vunnið ferð aftan á ferð, og longu undan vestanstevnuni vóru føroyameistararnir í seks av bátaflokkunum at kalla funnir. Tí er kanska at vóna, at okkurt óvæntað úrslit kemur á ólavsøku, so rógvarar fáa trúnna á, at tað ber til at steðga teimum sterkastu**

**KAPPRÓÐUR**

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Eingin ivi er um, at okkara kæra tjóðarítrótt hevur verið í einum aldudali hetta kappingarárið. Bátsmanningarnar hava bert verið millum 38 og 43 í tali til hvørja stevnu, og hetta er næstan helvtini færri, enn vit høvdu í fjør.

Mest sum í hvørjum króki í landinum hava kappróðraráhugað tosað um kreppu, og sjálvt um fleiri eisini hava roynt at tosa oman yvir eina kreppu, so er tað eitt faktum, at føroyski kappróðurin hevur sæð betri dagar enn júst nú.

Hvør orsøkin er, er ilt at meta um, tí tær kunnu vera so mangar. Onkur hevur sett spurnartekin við ta øgiliga venjingina, sum íðkararnir leggja í ítróttina, meðan onnur hava havt hug at leggja skyldina á inniróðurin, sum so brádliga tók yvir hjørtuni hjá meginpartin av teimum føroysku rógvarunum. Men er tað veruliga so, at nógv venjing og inniróður, sum í roynd og veru er ein síðugrein til kappróður, hava skyldina av keðiligu gongdini? Eg skal ikki koma við eini niðurstøðu her, men fari í staðin at hugleiða eitt sindur um kappróður.

## Ring ár hava verið fyrr

Lat tað verða sagt beinanvegin, at kappróður fyrr hevur sæð ring ár, har undirtøkan hevur verið sera lítil. Hetta er ikki fyrstu ferð, at slíkt er komið fyri, og hava vit tí alla grund til at vóna, at áhugin millum føroyingar aftur verður størri komandi ár.

Tað vísir seg ofta, at tá eitt soltið ár er farið aftur um bak, hvat viðvíkur talið av bátsmanningum, so veksur áhugin brádliga aftur, og hetta vóna vit fer at vera galdandi til komandi ár, soleiðis at vit aftur kunnu tátta í 70 bátsmanningum til hvørja stevnu.

Eg skal ikki siga við vissu, at talið fer at vaksa so nógv til komandi kappingarár, men eg ivist ikki í, at talið fer at vaksa, tí fleiri av róðrarfeløgunum kring landið gera eitt gott arbeiði.

## Eingin spenningur

Tað er ikki bert á sjógvi, at áhugin er lítil fyri kappróðri í ár. Talið av áskoðarum hevur heldur ikki verið serliga stórt á bygdastevnunum kring landið, og hetta má metast at vera rættiliga keðiligt.

Ein av størstu grundunum er helst lítli spenningurin, sum er í róðrunum. Longu undan vestanstevnuni vóru seks av teimum sjey kappingunum so gott sum avgjørdar, og í flestu róðrunum er at kalla eingin spenningur um útfallið.

Tí er tað mín vón, at feløgini kring landið fara at gera eitt megnar arbeiði til komandi kappingarár, soleiðis at vit aftur kunnu fáa spenning í kappingarnar hjá flestu bátaflokkunum. Fáa vit henda spenningin í aftur róðrarnar, so er eingin ivi um, at áskoðaratalið fer at vaksa, samstundis sum tað verður meir hugaligt hjá rógvarunum at fara í bátarnar.

Nú stendur okkara tjóðardagur so fyri framman, og tað er á ólavsøku, at síðsti kappróður á árinum er á skránni.

Eingin ivi er um, at í flestu róðrunum eru nakrir stórir favorittar undan ólavsøkuni, men hetta er tó eisini stevnan, sum øll ætla sær at vinna, og tí er eingin ivi um, at alt kann henda.

Tað er sjálvandi keðiligt fyri fremstu bátarnar í FM-kappingini, sum kanska hava vunnið allar hinar stevnurnar, um teir ikki eisini vinna á ólavsøku eisini, men tað er nú einaferð soleiðis, at allar bátsmanningar geva alt tað, ið eftir er, á ólavsøku. Og tað er altíð stuttligt, um okkurt óvæntað hendir, serliga um tað hendir á ólavsøku.

Eg vænti eisini, at tað kundi verið gott fyri føroyska kapprógving, um okkurt óvæntað hendir á ólavsøku. Hetta kundi víst rógvarum kring landið, at tað ber til at vinna á teimum mest sigursvandu manningunum, og at teir ella tær tí fara aftur í bátarnar til komandi kappingarár.

Við róðrarkvøðu og ynski um ein góðan ólavsøkuróður!